

*Komið er væl áleiðis við Eldrasambýlinum í Vagi* **Mynd: D. Olsen**

# Eldrasambýlið nærum liðugt

*Tað gongur væl við byggingini av eldasambýlinum í Vági og ætlandi kunnu fólk flyta inn 1. juli í ár*

DAGFINN OLSEN

Komið er langt við Eldrasambýlinum í Vági.

Jógvan Krosslá, býráðsformaður í Vági, sigur, at arbeiðið er komið rættiliga langt og at tað mest eru miðrúmini, uppihaldsrúm, ið eru eftir.

Pláss er fyri 12 fólkum, ið fáa góð rúm við wc og baði. Tvey dupult rúm eru.

Stigtakarar og kommuna eru væl nøgd og uppruna-liga tilboðið hevur hildið væl, soleiðis, at kostnaðurin er um 4 milliónir krónur.

Kommunan ger so nakað afturat við at fríðka um rundan um húsini, ið standa væl fyri við góðum útsýni yvir bygdina og fjørðin.


UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF

UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS



Nógv nýtt lekkurt og gott

UNITED COLORS OF BENETTON.

Sverrisgøta 17 • 100-Tórshavn • Tel. 317661

Leygardagin er opið til kl. 17.00

UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS

Sosialurin - 311820

UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF


# Lítið at frætta

*Lítið var at frætta frá samráðingunum millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í gjár*

DAGFINN OLSEN

Eftir at semingsmenninir í gjár eftir døgurða høvdu havt partarnar saman í eitt samdøgur á Hotel Føroyum, var lítið at frætta frá samráðingunum.

Bert semingsmenninir úttala seg undir samráðingunum, og teir gingu í gjár millum partarnar.

Allan Skaalum, ið saman við Rúna Heinesen er semingsmaður, segði eftir døgurða í gjár, at hetta verður óivað eitt longri umfar. Hann væntaði, at teir høvdu nógv fyri framman, men segði eisini, at orsøk var at halda fram.

Partarnir hava saman við semingsmonnunum tikið upp samansetingina av uppgávum hjá einum fólkaskúlalærara og tað, ið nýggja lógin krevur. Hetta er prinsippmál hjá báðum pørtum, har tey eru ójøvn á máli. Allan Skaalum helt í gjár, at tað gekk rætta vegin, men væntaði ikki at koma við semingsuppskoti í gjár.



*Annar semingsmaðurin, Allan Skaalum, væntar drúgvar samráðingar*

# Petur Prent í Tutl

*Í dag letur Petur Prent upp framsýning í Gongini í Havn*

Vanligt er, at listafólk sýna fram í handilshølunum hjá Tutl í Gongini í Havn. Har sleppa tey at hava myndir sínar hangandi í einar 4 vikur.



*Petur Prent Mikkelsen*

Næstur í røðini av listafólkum, ið sýna fram í Tutl, er Petur Mikkelsen. Betri kendur er gøtumaðurin sum Petur Prent, eftir at hann í mong ár starvaðist sum prentari í Havn..

Í dag klokkan 16 letur hann upp framsýning sína í handilshølunum hjá Tutl. Á sýningini eru oljumálningar og linomyndir. Á sýningini hevur Petur Prent 20 myndir við.

*- do -*

# Páskatónleikur um vikuskiftið

*Konsertir verða í Klaksvík, Gøtu og í Havn. Elsa Súsanna Dalsgaard og Daisy Johannesen syngja saman við strúkarum úr Føroya Symfoniorkestri*

DAGFINN OLSEN

Um vikuskiftið fara Elsa Súsanna Dalsgaard og Daisy Johannesen at syngja verkið Stabat Mater eftir G. B. Pergolesi.

Konsertirnar verða í kirkjuni í Klaksvík leygardagin klokkan 15. Í Gøtu Kirkju sunnudagin klokkan 15 og í Vesturkirkjuni í Havn sunnukvøldið klokkan 19:30.

Tær báðar fara at syngja saman við strúkarum úr Føroya Symfoniorkestri, sum Martin Mouritsen stjórnar.

Elsa Súsanna Dalsgaard úr Hoyvík hevur sangin sum livibreyð. Hon er útbúgvin sum sangari frá konservatoriuunum í Aalborg og í Keypmannahavn.Hon hevur júst fingið starv sum sangari við operakórið í Oslo.

Daisy Johannesen úr Klaksvík hevur verið á sangskúla í Íslandi og tekur sangtímar í Keypmannahavn.



*Elsa Súsanna Dalsgaard fer saman við Daisy Johannesen um vikuskiftið at syngja verk eftir Pergolesi*

Verkið Stabat Mater eftir G.B. Pergolesi er sonevndur páskatónleikur. Hann snýr seg um Mariu moy, ið syrgir undir krossinum.

Í skránni, sum konsertáhoyrararnir fáa, hevur Axel Tórgarð umsett tekstin til Føroyskt úr latíni.





*Aldurnar vóru upp í 12 metur vestasn fyri Mykines týsdagin, tá Glyvraberg heitti á vaktartænastuna um at fylgja skipinum til lands*

**Mynmd: Færøernes Kommando**

# Ungir suðuroyingar í havsneyð

*Týsdagin mátt línubáturin, Glyvraberg, úr Hvalba biðja um fylgi til lands, tí manningin ikki fekk stýrt bátinum orsakað av illveðri. Ikki fyrr enn hósmorgunin vann Glyvraberg upp land*

JOHN JOHANNESSEN

Línibáturin Glyvraberg, ið er ein 50 tonsari, kom illa fyri í illveðri vestan fyri Mykines týsdagin. Vindurin var nógvur við hvirlum upp í 25 metrar um sekundið og aldurnar ógvuliga høgar, millum 10 og 12 metrar. Hetta gjørdi, at manningin ikki fekk tamarhald á skipinum.

Glyvraberg bað Vaktar- & Bjargingartænastuna um at fáa fylgi til lands, men hildið varð, at vaktarskipið, Gormur, orsakað av illveðrinum var ov lítið til uppgávuna. Tí fekk danska verjuskipið, Hvidbjørnen, uppgávuna. Hetta var um middagsleitið.

**Fimm tímar at sigla**

Hvidbjørnen setti seg beinan vegin í samband við skiparan á Glyvrabergi og boðaði honum frá, at hjálpin fór at vera á staðnum klokkan fimm seinnapartin. Stóra verjuskipið fekk hildið eina ferð á 20 fjóðringar hóast høgu aldurnar. Meðan siglt varð hevði skiparin á Hvidbjørnen javnan samband við skiparan á Glyvrabergi.

Hvidbjørnen var á staðnum klokkan fimm seinnapartin, sum væntað, og fór beinan vegin at fylgja Glyvrabergi til lands. Orsakað av illverðrinum gekk hetta ógvuliga seint fyri seg. Skipini fingu ikki siglt skjótari enn 3 fjóðringar um tíman.

Frá Hvidbjørnen verður sagt, at Glyvraberg undir ferðini arbeiddi ógvuliga hart í sjónum, men kortini fekk tað bert ein skeivan sjógv, ið rakti stýrhúsið. Hesin sjógvur elvdi kortini ikki til nakran serligan skaða.

**Heima hósmorgunin**

Mikukvøldið klokkan átta, tá skipini bæði vóru komin suður um Mykines, fór fyrst radarin og síðani VHF urin á Glyvrabergi. Hetta gjørdi, at manningin á Hvidbjørnen gjørdi av at fylgja línubátinum heilt til lands.

Túrurin heim til Hvalba, har Glyvraberg hoyrir heima, gjørdist drúgvur. Ikki fyrr enn klokkan var farin yvir hálvgum eitt hósmorgunin vóru skipini komin í Suðuroyarfjørð, haðani Glyvrabeg helt fram inn á Hvalba uttan hjálp.

Við Glyvrabergi vóru fimm ungir mans, ið vóru farnir at royna eftir hávi við línu.



*Hóast veðrið var ógvuliga ringt, fekk Glyvraberg ongan serliga ringan sjógv*

**Mynd: Færøernes Kommando**


HEIMA BIO





I Kina spiser de hunde

Generalens datter

Deep Blue Sea

VIDEOTOP 10

VIKA 15

1 She's all that
2 The Blair Witch Project
3 Runaway Bride
4 Sex Games
5 Eyes Wide Shut
6 EDtv
7 Kærlighed ved første hik
8 Lokkeduen
9 Arlington Road
10 Wing Commander

| | |
|---|---|
| Í Gundadali | tel. 31 47 70 |
| Í Kollafirði | tel. 42 10 83 |
| Í Saltangará | tel. 44 91 33 |
| Í Klaksvík | tel. 45 73 53 |
| Í Sørvági | tel. 33 20 01 |
| Í Leirvík | tel. 44 33 60 |
| Í Skálafirði | tel. 44 12 00 |

petur & petur 320870

STATOIL

støðirnar kring landið